# Seta tiltøk í verk fyri at byrgja uppfyri fuglakrími



*Fuglakrím er best kent millum høsn og kalkunir, meðan sjófuglur tykist vera munandi meira mótstøðuførur*

**Danska matvøruráðið fylgir neyvt við gongdini í fuglakrími og fer nú at seta tiltøk í verk, har eftirlitið við eitt nú aling av høsnum og dunnum verður skerpað. Somuleiðis fer ráðið at senda út kunningartilfar og skipað verður yri temadegi um fuglakrím**

FUGLAKRÍM
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Orsøkin til hesi tiltøk er, at sjúkan í juli/ august í ár er vorðin staðfest í Kasakstan og Ruslandi.

Fuglakrím hevur seinastu tvey árini verið og er framvegis orsøk til álvarsligar heilsuligar trupulleikar hjá bæði menniskjum og dýrum, serliga í landsynningspartinum av Asiu. Hildið verður, at ferðafuglar eru orsøkin til útbreiðsluna, sum røkkur yvir stór økir.

### Vakið eygað

- Vit fylgja neyvt við gongdini kring um heimin og hava eitt vakið eygað við, um sjúkan nærkast fuglabølum og verpingarøkjum, haðani hugsandi er, at ferðafuglur kemur fram við í Danmark.

Í danska matvøruráðnum siga tey, at ein flokkur við villdunnum í danska býnum, Salling, varð avlívaður í september 2003. Hetta var av trygdarávum, tí staðfest var, at fuglurin var fongdur við tí, sum rópt verður "lavpatogen aviær influenza virus" av slagnum H5N7.

- Fuglarnir vórðu avlívaðir, tí vandi var fyri, at virusið kundi broytast til tað "højpatogena" slagið.

Matvørumálaráðið leggur tó dent á, at "højpatogen aviær influenza", sum fuglakrímið er staðfest í Danmark.

Orðið "aviær" vísir til, at talan er um fuglar.

### Kanningar í DK

Seinastu tvey árini hevur matvøruráðið gjørt kanningar av villum fugli í Danmark fyri at finna út av, um fuglurin kann vera fongdur við fuglakrími.

Bæði í 2003 og 2004 vórðu umleið 3000 ferðafuglar kannaðir hvørt árið, og her var í fyrsta lagi talan um dunnur og gæs.

- Kanningarnar staðfestu, at "lavpatogen aviær influenza" er vanlig í villum fuglum í Danmark, sigur matvøruráðið.

Sambært læknaligum keldum í Føroyum kann "lavpatogen influensa" í prinsippinum umbroytast til "højpatogen influenza", sum fuglakrímið verður rópt, men sum skilst, veit eingin um, at hetta nakrantíð er hent.

Vísandi til kanningarnar í Danmark, hevur danska matvøruráðið sett nøkur tiltøk í verk, sum eitt nú snúgva seg um, at eftirlit verður í allari framleiðsluni av høsnarungum, har blóðroyndir verða tiknar í øllum høsnarungaflokkum. Eisini skulu frískir ferðafuglar kannast eins og fuglar, sum verða funnir deyðir við vøtn.

Danir fara eisini at seta í verk nýggjar reglur fyri aling av villdunnu, og reglur verða eisini gjørdar um, at høsn og dunnur skulu alast hvør sær.

### Upplýsing

Matvøruráðið fer at senda út upplýsingartilfar um tiltøk, sum kunnu verja móti smittum, bæði um handilsliga aling av høsnarungum og dunnum, og har kríatúrini verða ald til egna nýtslu.

Í endanum av hesum mánaðinum fer matvøruráðið eisini at skipa fyri temadegi, har serfrøðingar á økinum og umboð fyri vinnulívsfelagsskapir verða við.

# Fimm kommunur samstarva nú um barnaverndarøkið

BARNAVERND
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin undirskrivaðu fimm kommunur í Eysturoy avtalu um eina felags barnaverndartænastu.

Kommunurnar, sum eru við í avtaluni, eru Funnings-, Sjóvar-, Nes-, Runavíkar- og Gøtu kommuna.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, skal eisini skriva undir avtaluna, sum umboðini fyri hesar fimm kommunurnar staðfestu týsdagin.

Sambært lógini um Barnavernd, verður barnaverndarøkið frá 1. januar 2006 lagt út til kommunurnar at umsita, og tað er í hesum sambandi, at kommunurnar í Eysturoy nú eru gingnar saman um hesa avtalu.

Tær fimm kommunurnar eru samstundis tær fyrstu, sum hava gjørt avtalu um felags barnaverndartænastu.

Hvør kommuna hevur tvey umboð í barnaverndini, soleiðis at talan er um tilsamans 10 fólk, sum skulu skipa fyri á hesum øki.

Umsitingin av barnaverndartænastuni hjá kommununum verður partur av sosialu umsitingini hjá Runavíkar kommunu.

Fólkatalið í hesum fimm kommunum er 7.061, harav 2.077 eru frá 0 – 18 ár, sum er tann bólkurin, ið lógin um barnavernd fevnir um.

Søguliga undirskrivingin fór fram í sambýlinum hjá Gøtu kommunu í Norðragøtu.

Nýggja lógin um barnavernd áleggur teimum smærru kommununum at finna saman við øðrum kommunum, soleiðis at hvørt barnaverndarøkið í minsta lagi telir 1500 fólk.



# Fuglakrím: Deyðstíttleikin kann verða heilt upp í 100%

**Fuglakrím er ein virussjúka, sum tilvildarliga hevur stungið seg upp kring um heimin og er kend heilt aftur til 1878**

FUGLAKRÍM
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fuglakrím – ella aviær influenza, sum sjúkan verður rópt á donskum, er ein smittandi virussjúka hjá fuglum, sum kann elva til, at heilir flokkar av høsnum doyggja. Tað merkir, at deyðiligheitin kann verða heilt upp til 100%.

Fuglakrím er ein virussjúka, sum tilvildarliga hevur stungið seg upp kring um heimin og er kend heilt aftur til 1878.

### Øll fuglasløg

Øll sløg av fuglum kunnu verða rakt av sjúkuni, men ógvuliga ymiskt er, hvørji fuglasløg eru mest sárbar.

Sjúkan er best kend millum høsn og kalkunir, meðan sjófuglur tykist vera munandi meira mótstøðuførur.

Fuglakrím stendst av "influenza-A-virus", sum hoyrir til orthomyxvirusfamiljuna. Tað vísir seg, at virusið, sum er tað mest sjúkuelvandi, er funnið í sløgunum H5 og H7.

### Sjúkueyðkenni

Sjúkueyðkennini eru ymisk eftir umstøðunum, og tí er ógvuliga torført at siga, um talan er um fuglakrím.

Deyðstíttleikin er stórur, eggjaframleiðslan steðgar, trupulleikar eru við andadráttinum, eygnabruni við útfloti, vætusamling í høvdinum og blóðsamling kunnu vera tekin um fuglakrím.

## Eingin viðmerking

FUGLAKRÍM
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin fregnaðist fyrrapartin í gjár, um føroyingar ætla sær at taka nøkur stig, nú danir eru farnir at seta ítøkilig tiltøk í verk til tess at byrgja uppfyri fuglakrími.

Á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni vísti Bárður Enni, stjóri, til landsdjóralæknan og landslæknan, men fyrrapartin í gjár eydnaðist ikki Sosialinum at fáa orð teir báðar.

Í vinnumálaráðnum var landsdjóralæknin, Bjørn Harlov, upptikin á fundi og landslæknin, Høgni D. Joensen, var eisini upptikin.

Vit fara at venda aftur til spurningin um fuglakrím í einum øðrum blaði.